VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinnapartin upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og eystri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 16 stig.

Veðrið av tí fræga

Veðurmaðurin hjá Sosialinum og Rás2, Petur Skeel Jacobsen, er rímuliga bjartskygdur viðvíkjandi veðrinum undir Summar Festivalinum. Tá vit bóðu hann útdjúpa forsøgnirnar, sum kunnu lesast til vinstru her á síðuni, segði hann, at veðrið verður gott í kvøld, men at nakað av vindi av landnyrðingi og eystri helst verður leygardagin og kanska serliga leygarkvøldið. Hetta merkir, at veðrið eisini verður gott fríggjadagin og helst langt út á leygardagin og kanska kvøldið eisini. Hitin verður absolutt eisini til at liva við, tí hann fer at liggja úr 10 upp í 14 stig. Helst verður tað ikki fyrr enn sunnudagin og mánadagin, tá festivalurin er væl og virðiliga av, at veðrið verður eitt sindur keðiligari við meiri vindi. So alt í alt kunnu festivalgestirnir gleða seg til, at veðurgudarnir eru í munandi størri gávuhýri, enn teir vóru í fjør, tá veðrið var av vestfallinum til tað seinasta kvøldið.

-km

Alt bendir á, at veðurgudarnir verða rættiliga blíðir í dag og komandi dagarnar, tá Klaksvíkin er karmur um landsins størsta festival

Savnsmynd

Petur Skel Jacobsen lovar gott veður meginpartin av Summar Festivalinum

Savnsmynd

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	7
Nuuk	10
Qaqortoq	16
Ammassalik	11
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	11
Lerwick	15
Aberdeen	16
London	18
Tromsø	--
Bergen	15
Oslo	--
Stokkhólm	22
Keypmannah.	23
Helsinki	13
Moskva	16
Berlin	23
Warzawa	24
Kiev	25
Bukarest	29
Paris	23
Madrid	34
Róm	29
Malorca	29
Athen	31
Malta	32
Tunis	32
Beijing	32
New Dehli	31
Bangkok	31
Jakarta	30
Sydney	15
New York	27
Miami	29
Los Angeles	22
Meksikobýur	--
Panama	29
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	10

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1020 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og viknar.



Í dag:
Hátrýstið í útsynning vestan úr Føroyum viknar framvegis. Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum stendur mestsum í stað og brúgvalgið haðani verður væntandi yvir Føroyum um vikuskifti

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 03/08 kl. 06⁰⁰ – 04/08 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/08 kl. 06⁰⁰ – 04/08 06⁰⁰.
Avfallið higartil í august: 2 mm

VESTFALLSKYRRINDI

30. august	Mánin næstur jørðini
1. august	Tendring
8. august	Fyrra kvarter
10. august	Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
7. aug.	11:49	-	10:49	23:10	11:04	23:25	1:28	13:49	2:28	14:49	10:04	22:25	9:04	21:25	-	12:04	0:43	13:04	11:34	23:55	0:28	12:49
8. aug.	0:10	12:46	11:46	-	-	12:01	2:10	14:46	3:10	15:46	11:01	23:37	10:01	22:37	0:25	13:01	1:25	14:01	-	12:31	1:10	13:46
9. aug.	1:22	13:59	0:22	12:59	0:37	13:14	3:22	15:59	4:22	16:59	-	12:14	11:14	23:51	1:37	14:14	2:37	15:14	1:07	13:44	2:22	14:59
10. aug.	2:36	14:59	1:36	13:59	1:51	14:14	4:36	16:59	5:36	17:59	0:51	13:14	-	12:14	2:51	15:14	3:51	16:14	2:21	14:44	3:36	15:59
11. aug.	3:23	15:45	2:23	14:45	2:38	15:00	5:23	17:45	6:23	18:45	1:38	14:00	0:38	13:00	3:38	16:00	4:38	17:00	3:08	15:30	4:23	16:45

Lesið Sosialin